TALV


John Rødgaard skrivar:

Í Nimzowitch Memorial kappingini í Næstved gekst illa hjá Nunn í byrjanini, tí hann tapti tvey tey fyrstu talvini.

Talvið í 2. umfari minti meg um okkurt áður sætt.

H: Chandler, GM
S: Nunn, GM

1e4	**e5**
2. Rif3	**Ric6**
3. Bb5	**a6**
4. Ba4	**Rif6**
5. 0—0	**Rixe4**
6. d4	**b5**
7. Bb3	**d5**
8. dxe5	**Be6**
9. Ribd2	**Ric5**
10. c3	**d4**
11. Bxe6	**Rixe6**
12. cxd4	**Ricx4**
13. Rie4	**Be7**
14. Be3	**Rif5**
15. Rc2	**0—0**
16. Rad1	**Rixe3**
17. fxe3	**Fc8**
18. Rid4	**Rixd4**
19. exd4	**Fe6**



Í hesi støðu er fyrr roynt 20. Rd3 og 20. Rf3, men hvítur hevur ikki fingið stórvegis burturúr. Hübner vann nýliga Ljubojevic við 20. Fxc7. Men Chandler valdi at leika

20. Rig3

og framhaldið varð:

20. — f6?
21. Rif5 fxe5??
22. Fb3

Hvítur vinnur nú ein mann, so svartur gavst.

Um onkur heldur seg hava sætt hetta fyrr, er tað ikki at undrast á. Ti talvið er ein beinleiðis endurtøka av talvinum Ceskovskij-Jusupov í Erevan 1982! Tað finna vit í Informator 33, síðu 183! Heldur ikki stórmeistararnir kenna alt.

Men hetta tema minnir meg um eitt annað talv frá OHRA-kappingini í ár (tann einasta, Karpov telvaði millum HM-dystirnar móti Kasparov).

Úrslitið varð:

1. Karpov, VM	7
2. Timman, GM	6 1/2
3. Nunn, GM	5 1/2
4. Miles, GM	4 1/2
5. Martinovic,GM	3 1/2
6. Sunye, IM	3

H: Miles, GM
S: Timman, GM

1. Rif3	**Rif6**
2. c4	**c5**
3. b3	**d5**
4. cxd5	**Rixd5**
5. Bb2	**f6**
6. Ric3	**e5**
7. Rixd5	**Fxd5**
8. e3	**Be6**

8. -, e4 hevði tvingað riddaran inn aftur á g1, men hevði samstundis latið upp fyri Bb2.


9. Bc4	**Fd7**
10. 0—0	**Bc4**
11. bxc4	**Be7**
12. d4	

Aftur fyri veiku finnuna á c4 fær hvíta fólkið gott spæl.

12. -	**cxd4**
13. exd4	**exd4**
14. Rixd4	**0—0**
15. Ff3	**Ric6**

Nú hevði 16. Rixc6 verið tað sama sum at biðið um javnt.

16. Rif5!?



Hvítur hóttir 17. Fg4, ið vinnur frúnna. Timman tyktist ikki vera heilt vakin, tí hann leikaði

16. - Rie5??

og so gjørdi Miles skjótt av við

17.Bxe5 fxe5
18. Fd5!

Svartur missur nú mann, so hann gavst.

HM-finalan fyri lið fór fram í Luzern herfyri. Hon endaði soleiðis:

1. Sovjet	37 1/2
2. Ungarn	34 1/2
3. Ongland	30 1/2
4. Frakland	28 1/2
5. Rumenia	28 1/2
6. Sveits	27 1/2
7. Kina	27
8. Argentina	25 1/2
9. V-Týskland	23 1/2
10. Afrika	7

Sum sæst, hendi einki serliga óvæntað. Tað verður viðmerkt, at USA gav avboð av figgjarligum orsøkum, og at Afrika var umboðað av einum úrvaldum liði og ikki av einum stakum landi. Heimsmeistarin Kasparov var ikki við, men Karpov kom sera væl frá kappingini við 6 stigum fyri 8 umfør. Men uppaftur betri var úrslitið hjá gamla fíggjinda hansara Korchnoi, ið telvaði fyri Sveits og fekk 7 1/2 stig fyri 9 umfør!

Umdysturin frá Kandidatkappingini í Montpellier millum Imman og Tal endaði við 3—3. Tað merkir, at tað verður Timman, ið sleppur at halda fram í sjálvari kappingini, tí hann hevði betri korrektión.

Farið verður undir semifinalurnar í januar, og telvararnir verða hesir:

Vaganjan, Jusupov og Sokolov úr Sovjet og Timman úr Hollandi.

Heimsmeistarin Kasparov hevur játtað at telva eina kapping upp á 6 tølv við Timman, GM. Hesin spennandi dystur verður í døgunum 15.—22. desember. Eg kundi hugsað mær at vitað, hvat Kasparov fær burtur úr peningaliga!

Bridge

S/NS	Sp K9 Hj EJ10832 Rú 105 Kl J74	
Sp E65 Hj D96 Rú EK72 Kl E83	N V E S	Sp J Hj 75 Rú J9843 Kl D10962
	Sp D1087432 Hj K4 Rú D6 Kl K5	

Suður (Harrison-Gray) opnaði 3 sp, sum vestur straffiduplaði.

Vestur tók fyri rútar ess, kong og kleyvar ess, og spældi síðani kl. 3.

Hvussu skal suður spæla?

Tað ræður sjálvandi fyrst og fremst um at spæla soleiðis, at hann bert missir eitt stikk í spaðara og ikki tvey. Dublingin hjá vesturi peikar sjálvsagt á, at hann kann hava EJx(x), men tá hann hevur víst tvey ess og ein kong, nýtist hann ikki eisini at hava sp J. Tað hevði verið tápuligt at klípt við sp 9 og latið eystur fingið stikk fyri sp J einsamallan.

Hetta hugsaði Gray eisini skjótt og legði kl J á, eystur kl D, og suður fekk fyri kleyvar kong. Hann tók nú fyri hj K og spældi sp 2.

Nú skuldi vestur siga honum, hvussu spaðarin skuldi spælast!

Hevði vestur sp Ex ella Exx, tók hann óivað við essinum fyri at geva makkaranum tað væntaða stikkið í kleyvara, men tók hann ikki, var tað helst tí hann hevði bæði sp E og J og roknaði við tveimum trumfstikkum — men so ætlaði Gray at klípa við sp 9.

Vestur stakk við essinum!



Revolvarabridge

007 — James Bond hevur havt nógv jørn í eldinum — harímillum hevur hann eisini spælt bridge.

Eg vil tó mæla spælarum á byrjunar- og meðalstigi at fara meira varliga fram enn 007 í hesum spælinum — ein skal nokk eita James Bond fyri at sleppa livandi frá borðinum aftaná.


S/øll	Sp 10987 Hj 6543 Rú - Kl 76532	
Sp 65432 Hj 109872 Rú J109 Kl -	N V E S	Sp EKDJ Hj EKDJ Rú EK Kl KJ9
	Sp - Hj - Rú D8765432 Kl ED1084	

Suður (J.B.) opnar við 7 kl! Eystur dublar, so borðið brakar, men James redublar isakaldur.

Vestur spældi rú J út (útspælið er likamikið), og J. B. stakk kvikliga á borðinum, spældi trumf til djúpa kliping, stakk ein rútara afturat og klípti trumf enn einaferð, tók fyri kleyvar ess, og rútarin stóð. Jú slíkt er revolvarabridge.

Mortan

Ståldragarar




primaðir

pf VESTMANNA TIMBURHANDIL

3860 Vestmanna . Telefon 24170

Skreytlutir úr føroyskum grótti

VIT GERA



Skreytmyndir, lampur, stakar, snapsagløs, ítróttarvinningar, eisini selja vit flaggstengur við føroyskum grótfóti o.a.

Vit seta eisini áskrift í nátúrstein og gera umvælingar og nýggja áskrift í eldri stein.

Ringið,· skrivið, ella støkkið inn á gólvið.

ÁRNI ZISKA
Tlf. 48119 - Strendur